




# Hátíðardámur á Bryggjuni

**Sætta árið á rað verður fjølbroytt og festligt ólavsøkuhald á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn við millum annað dansi, tónleiki, felagssangi, fýrverki, gudstænastu og sjónleiki**

Føroyingar og føroyavinir koma saman til gaman á Norðurbryggjuni sjálvan ólavsøkuaftan, tá kappróðrin verður varpaður út heima úr Føroyum.

Hetta er sætta árið á rað, at ólavsøkan verður hátíðarhildin á Norðurbryggjuni. Eftirhondini er hon vorðin ein somikið fastur táttur í stóra summartilboðunum í høvuðstaði dana, at fólk rokna við, at eitthvørt verður fyriskipað.

Undirtøkan hevur verið sera góð øll árini, og nú eru bæði Føroyahúsið og feløgini har komin í eina fasta legu við nevndini »Skt. Olavfestens venner« á odda.

Nevndin sigur seg fegnast um, at tiltøkini hvíla í sær sjálvum fíggjarliga, og at nakrir sponsorar hvørt ár stuðla so væl. Men, eins og heima í Føroyum, veldst undirtøkan nógv um veðrið.

Eitt serstakt tiltak er gudstænastan, sum á øðrum sinni verður í listaskálanum á Bryggjuni, so alt fer fram á sama stað. Tað óføra vakra fýrverkið undir midnáttarsanginum er ein annar fastur táttur, sun fólk á Bryggjuni og í Nýhavn glaða seg til á hvørji ólavsøku.

Í ár verður eisini roynt at seta ein lítlan flótandi leik á pall í sjónum við bryggjukantin.

– Við grillmati, smurdum breyði, drykkivørum og góðum tónleiki bæði til sang og dans er tað okkara vón, at tað aftur hesaferð skal eydnast at skipa ein hugnaligan "føroyskan dag" á Norðurbryggjuni, har øll eru so hjartans vælkomin, sigur Martin Fjallstein, sum er skrivari í nevndini Skt. Olavfestens venner í Keypmannahavn.

Hini í nevnini eru Heini Davidsen, Hans Petur í Brekkunum, Mogens Nielsen, Judith Nielsen, Jógvan Svabo, Jóannes Højgaard og Gert Róðá.

Meira fæst at vita um ólavsøkuna á heimasíðuni hjá føroyahúsinum www.faroehouse.dk og á Facebook/ Gert Róða.

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*




## Ferðaætlanin á ólavsøku 2009

### Oyggjaleiðir:

**Smyril – Teistin og Ritan sigla soleiðis um ólavsøkuna:**

| | Ólavsøkuaftan 28/7 | Ólavsøkudag 29/7 |
|---|---|---|
| **Leið 7: Smyril** | | |
| Tvøroyri - Tórshavn: | 06:00 og 11.00 | 07:00 og 13:00 |
| Tórshavn - Tvøroyri: | 08:30 og 22:00 | 09:30 og 02:00 ( 30 juli – 2009 ) |
| **Leið 60: Teistin** | Sum Leygardag | Sum Sunnudag |
| **Leið 90: Ritan** | | |
| Tórshavn – Nólsoy: | 07:55, 09:30, 12:00, 19:00 og 22:00<br>Siglt verður úr Nólsoy uml. 25 min. seinni | 09.30, 13:00,19:00 og 22:00 |

### Bygdaleiðir:

**Leið 100 Tórshavn - Vestmanna:**

**Ólavsøkuaftan** Sum sunnudag við eykatúri úr Vestmanna kl. 21:00 og úr Havn kl. 22:00

**Ólavsøkudag** Sum sunnudag við eykatúri úr Vestmanna kl. 21:00 og úr Havn kl. 22:00

**Leið 101 Tórshavn - Gamlarætt:**

**Ólavsøkuaftan** Sum leygardag Koyrt verður eftir Ringvegnum

**Ólavsøkudag** Sum sunnudag Koyrt verður eftir Ringvegnum
Ólavsøkuaftan, Ólavsøkudag og fyrrapartin 30. juli verður ikki koyrt gjøgnum miðbýin, men ístaðin eftir R.C. Effersøesgøtu og síðani eftir Ringvegnum.

**Leið. 200 – 205: Ólavsøkuaftan & Ólavsøkudag: Sum sunnudag**

Við eykatúri frá Oyrabakka kl 18:00 til Gjógv.

**Leið 300 Tórshavn - Flogvøllurin:**

**Ólavsøkuaftan** Sum sunnudag
Eykatúrar: úr Havn kl. 21:30.

**Ólavsøkudag** Sum Sunnudag
Eykatúrar: úr Havn kl. 21:30.

**Leið 400 Tórshavn – Klaksvík**

**Ólavsøkuaftan** Sum sunnudag: Eykatúr úr Havn kl 21:30
**Ólavsøkudag** Sum Sunnudag: Eykatúr úr Havn kl 21:30

**Leið 480**

**Ólavsøkuaftan** Sum Sunnudag
Eykatúrar: 22:25 Skálabotnur - Strendur (samb. úr Havn)
**Ólavsøkudag** Sum Sunnudag
Eykatúrar: 22:25 Skálabotnur - Strendur (samb. úr Havn)

**Leið 600 Skopun - Skálavík:**

**Ólavsøkuaftan** Sum leygardag
Tó ur Skálavík kl 11:45
Úr Dali kl 11:40 og Húsavík kl. 11:50 Á Sandi kl 12:05 til Skopun
**Ólavsøkudag** Sum sunnudag

**Leið 601 Skopun - Dalur:**

**Ólavsøkuaftan** Sum leygardag
**Ólavsøkudag** Sum sunnudag

**Leið 700 Tvøroyri - Vágur/Sumba:**

**Ólavsøkuaftan** Úr Sumba: kl.05:00, 09:45.
Av Krambatanga kl. 10:35 og 23:55
**Ólavsøkudag** Úr Sumba: kl. 06:00 og 12:00
Av Krambatanga kl. 11:30 og 03:50T (30.juli – 2009)
Tilkall áðrenn kl.22.00 kvøldið fyri á tel. 23 95 50

**Leið 701 Sandvík - Tvøroyri :**

**Ólavsøkuaftan** Úr Sandvík: kl. 05:10, 10:10
Av Tøroyri kl.05:35 - 10:35
Av ferjuleguni: kl. 10:30 og 23:55
**Ólavsøkudag** Úr Sandvík: kl. 06:10 og 12.10
Av Tvøroyri. Kl. 06:35 og 12.40
Av ferjuleguni: kl. 11:30 og 03:50T ( 30.juli – 2009 )
Tilkall áðrenn kl. 22:00 kvøldið fyri á tel..22 26 90

**Leið 701 Famjin - Tvøroyri:**

**Ólavsøkuaftan** Úr Fámjin: kl. 05:30, 10:10.
Av ferjuleguni: kl. 10:30 og 23:55
**Ólavsøkudag** Úr Fámjin: kl. 06:30 og 12.10
Av Tvøroyri kl. 12:40
Av ferjuleguni: kl. 11:30 og 03:50T ( 30 juli – 2009 )
Tilkall áðrenn kl.22.00 kvøldið fyri á tel. 21 23 24

STRANDFARASKIP LANDSINS






**EINGIN IVI ER UM** at drekkivatnið í Føroyum kann gerast nógv betri, bæði til dagligt brúk og í sambandi við flakaframleiðslu v.m. Vatnið átti at verið nógv reinari, og so leingi hetta ikki er fingið í rættlag kring alt landið hava vit ein óneyðugan heilsuvanda.







MicroDrop Aqua er eitt slóðbrótandi FO-DK felag við vitan í heimsklassa. Vit kunnu tryggja føroyingum reint vatn, soleiðis at vatngóðskan, við garanti, lýkur øll ES krøv.

Hetta kunnu vit gera gjøgnum ta serfrøði innan drekkivatn sum vit ráða yvir, og sum vit hava innbygt í standard loysnir.

Okkara tøknifrøði er umhvørvisvinarlig, krevur lítla orku og byggir á natúrligar tilgongdir.

Atgongd til reint vatn átti at verið ein sjálvfylgja allastaðni. Vit arbeiða á altjóða stigi fyri hesum, og samstarva m.a. við herin, ES og ST stovnin UNICEF Supply.

*Myndirnar omanfyri eru frá okkara levering til Norðadals herfyri. Tað skal vera líka so einfalt hjá einari kommunu at keypa loysn til vatnveiting sum hjá einum húsarhaldi at keypa vaskimaskinu!*

**Við MicroDrop Aqua** er eingin ivi um hvørja loysn kommunan fær, og heldur eingin ivi um hvør kostnaðurin er. Harafturat veita vit trygd fyri at skipanin er klár innan 6 vikur aftan á endaliga bílegging. Og longu tríggjar dagar aftan á levering er klárt at drekka 100% reint vatn!



Reint drekkivatn er ikki 'bert' eitt ES krav. Tað er eitt fólkakrav, sum nú eisini verður reist í Føroyum.

Tosa við Jákup á Lag
fyri at fáa meira at vita
Telefon: 58 40 20
reintvatn@olivant.fo

MicroDrop
Nature's Way to Pure, Tasty Water. ™